# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Føðingardagar

### 80 ára føðingardagur

Tórsdagin 1. juli verður Torleif Bech, Þorkeri, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### 80 ára føðingardagur

Fríggjadagin, 2. juli verður Heini Olsen, Tórshavn, 80 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Heina, eru hjartaliga vælkomin í Kovalág 10, 2. juli millum kl. 10 og 14.

### 70 ára føðingardagur

3. juli verður Hjørleif Johannesen, Vágur, 70 ár. Vælkomst verður sunnudagin 4 juli á hotell Bakkanum í Vági frá kl 13.00 til 18.00 .

### 65 ára føðingardagur

Fríggjadagin 2. juli fyllir Óli A. Jacobsen, Ovaragøta 19 Hoyvik, 65 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 3. juli frá 10-15, hjá Jonnu og Andreas, Einarsgøtu 2 Hoyvik. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Prógv

Poli Gunnarsson Dølum, Tórshavn, hevur tikið prógv sum skipari á Skagens Skipperskole tann 23. juni.

## Prógv



Frá 21. mai til 25. juni 2010 gjørdi Róðin Eyðunsson á Lofti í Sandavági sveinaroynd sum maskinsnikkari á Skive Tekniske Skole í Danmark. Róðin hevur staðið í læru hjá Sp/f Træsmiðjuni í Mykinesgøtu í Havn.



## Prógv

Tann 22 juni 2010 tók Heri Sigurd Lamhauge Saltangará, prógv sum Master of Science in Economics and Business Administration, Cand Merc (Organisation og Strategi) á Aalborg Universiteti.

# Ingigerð 25 ára starvsdag



Í sambandi við at stjórin á Kunningarstovuni í Havn, Ingigerð á Trøðni, hevur 25 ára starvsdag, verður almenn móttøka á Kunningarstovuni hósdagin 1. juli.

Ingigerð er fødd á Frederiksberg, dóttir Karen, f. Olsen, úr Helsingør, og Heina á Trøðni úr Havn.

Eftir lokið studentsprógv tók hon lærarapróg á Københavns Dag- og Aften Seminarium í 1969.

Hon var lærari í Hvidovre, áðrenn hon í 1970 fekk starv sum lærari á venjingarskúlanum í Havn. Hetta starv røkti hon til 1985, samstundis sum hon undirvísti á Føroya Handilsskúla frá 1975-85.

Í 1983/84 var hon á árskeiði á Fróðskaparsetri Føroya við serligum denti á siðsøgu og enskt. Saman við Marionnu Simonsen hevur hon greitt úr hondum lærubókina Maskinskriving I .

Síðan 1. juli 1985 hevur Ingigerð verið stjóri á Kunningarstovuni. Eitt av hennara hjartamálum er gongubólkurin hjá Felagnum Tórshavn, sum hon saman við øðrum var við til at stovna í 1993. Tey skipa fyri gongutúrum í Føroyum og eisini uttanlands. Hon er eisini ferðaleiðari á gongutúrum, eitt nú í gomlu Havnini.

Rødd hennara er eisini kend frá útvarpinum hjá Kringvarpinum hesa árstíðina, har hon frá Kunningarstovuni lesur veðurtíðindini til tey vitjandi á donskum og enskum.

Ingigerð er gift við Kjartani Kristiansen úr Havn, tey eiga døturnar Kristinu og Sissal umframt ommu- og abbabørn.

Móttøkan verður hósdagin frá kl. 15-17, har øll eru vælkomin.

-red

# Countrykongurin á G!

**Ráðandi countrykongurin í Føroyum í løtuni, er Hallur Joensen. Hallur fer at spæla á G! Festivalinum, og tað merkir uttan iva, at fólk fer at svinga til kendar tónar**



Meðan ein partur fer í Grundina at sveiggja til elektroniskar rytmur, so fara helst minst líka nógv at taka sær ein góðan gamaldags "sving om" á Spæliplássinum.

Tað er leygarkvøldið á G!, tá klaksvíkingurin, ið byrjaði sína yrkisleið sum tónleikari í Danmark í 90'unum, og sum nú er heimskendur í Føroyum fyri egnar tulkingar av víðagitnum country-sangum, er settur at fáa gott lag á fólkið.

Og tað fer uttan iva at eydnast. Tí umframt at hava givið tvær fløgur út – "Pickin' Time In Nashville" (2008) og "Smile" (2009) – er Hallur eisini virkin hvørt vikuskifti við framførslum av ymsum slag. Countrykonsertir, gospelkonsertir, stevnudansir og alt møguligt annað. Tað sigur nógv, at tá Hallur fyri stuttum síðani hevði ókeypis útikonsert á stilladsinum uttan fyri húsini hjá sær, í regni og vindi, væl at merkja, ja, tá troppaðu næstan túsund fólk upp. Til tess krevst fólkatekki. Og tað hevur Hallur í yvirmát.

Og tað er ikki bara í Føroyum at fjepparar fylkjast um Hall. Eisini hava útvarpsstøðir bæði í Japan og ymsastaðni í Evropa valt at seta løg og útsetingar hjá ráðandi føroyska countrykonginum í umfar.

G! áhoyrararnir kunnu gleða seg til ektaðan og hjartaligan country-sang, sum hevur bæði beinini plantað væl á jørðina, og sum samstundis svingar so tað ikki ber til at standa ella sita stillur.

*www.gfestival.fo*

**Fyri 20 árum síðan:**

# Bachelors og Arts í 1990



Fríggjadagin 29. juni 1990 skrivar tíðindablaðið Sosialurin, at mikudagin fingu teir fyrstu seks nemingarnir handað prógv sum Bachelors og Arts í søgu og siðsøgu á Fróðskaparsetri Føroya. Nemingarnir eru f.v.: Erland Viberg Joensen, Hans Andrias Sølvará, Elin Súsanna Jacobsen, Hansina Berg, Anna Vágsheyg Lützen og Ásla Weihe.

*Kelda: Tíðindablaðið Sosialurin 29. juni 1990*